# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eingin her visti nakað um Alexander Litvinenko, fyrr enn hann var deyður*
*russiskir fjølmiðlar*



# Mæla til afturtøku

**Tann sokallaða Baker-nevndin fer at mæla George W. Bush, forseta til at fara undir afturtøku úr Irak**

Nevndin við fyrrverandi uttanríkisráðharranum James Baker á odda varð sett til at geva Bush og stjórnini tilmæli um, hvørji stig USA eigur at taka í krígnum í Irak. Nevndin fer at leggja sítt tilmæli fram tann 6. desember, men longu nú er greitt, at hon fer at mæla forsetanum til at skerja hermannatalið í Irak.

Blaðið The New York Times sigur seg hava fingið at vita frá vælvitandi keldum, at eftir tilmælinum hjá nevndini skal USA leggja á annan bógv í Irak, soleiðis at amerikanski luturin verður at styðja iraksku myndugleikarnar heldur enn at kríggjast við mótstøðumenn. Eygleiðarar siga við blaðið, at tilmælið um afturtøku er helst ætlað at leggja trýst á iraksku myndugleikarnar fyri at fáa teir leggja støtti dent á at menna herin og løgregluna.

Harafturat mælir nevndin til eina ráðstevnu millum londini í Miðeystri. Endamálið er at fáa Iran og Sýria-land upp í málið, skrivar The New York Times.

Eygleiðarar í Washington siga, at tað verður torført hjá forsetanum at skáka sær undan tilmælinum frá Baker-nevndini, serliga tí at hon er samd um tilmælið. Í nevndini eru fimm republikanarar og fimm demokratar.

Suðurkorea boðaði í gjár frá, at tað fer skjótt undir at taka sínar hermenn úr Irak.

*James Baker, fyrrverandi uttanríkisráðharri, er formaður í Baker-nevndini.*

## STUTT SAGT

### Stillar upp

Franski innanríkisráðharrin, Nicolas Sarkozy, kunngjørdi í gjár, at hann ætlar sær at stilla upp á forsetavalinum næsta ár. Í januar skal flokkur hansara, UMP, taka støðu til, hvønn hann skal stilla upp, og sum er bendir alt á, at tað verður Sarkozy. Vinnur hann uppstillingina, skal hann kappast við valevnið hjá sosialistunum, Segolene Royal. Meiningakanningar vísa, at tey bæði hava líka góðar møguleikar at vinna forsetavalið, sum verður tann 22. apríl.

### Bræv til USA

Í einum opnum brævi til amerikanska fólkið heitit iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, á USA um at taka seg aftur úr Irak og at viðurkenna eitt sjálvsstøðugt palestinskt ríki. Í brævinum, sum er fimm síður, skrivar forsetin, at amerikanska stjórnin hevur gjørt seg seka í tvingsli, valdsnýtslu og órættvísi, og hann biður amerikanska fólkið ímynda sær, hvat tað kundi fingið fyri allar teir pengarnar, sum kríggið í Irak hevur kostað USA. Eitt nú kundu tey, sum mistu hús og heim av ódnini Katrina, havt tað gott í dag, skrivar Ahmadinejad.

### Ford sparir

Umleið 38.000 starvsfólk hjá amerikanska bilframleiðaranum Ford hava góðtikið, at tey skulu farav frá fyrr enn ætlað. Orsøkin er, at Ford hevur havt fleiri milliardir krónur í halli av veksandi kapping frá bilverksmiðjum í Asia. Eygleiðarar siga, at Ford misti einar 35 mia. krónur nýggju teir fyrstu mánaðarnar í ár, og leiðslan hevur boðað frá, at 16 verksmiðjur verða stongdar. Sparitiltøkini hava við sær, at næstan helmingurin av starvsfólkinum hjá Ford missir arbeiðið.

## Samvitskufullur ruskmaður

Mitt í ruskdunganum fann ein brasilskur ruskmaður eitt kuffert við pengum.

Tá tann 43 ára gamli José Sebastian Batista Bereta kom fram á kuffertið og sá, hvat var í tí, kundi hann ikki annað enn taka tað við sær til hús. Í kuffertinum vóru 12.000 reals, sum svarar til einar 30.000 krónur ella meiri enn tvær árslønir hjá einum brasilskum ruskmanni.

Í kuffertinum vóru eisini nakrir kekkar við navninum á manninum, sum átti kuffertið, og José Sebastian Batista Bereta valdi at fara til eigaran við tí. Tað vísti seg, at maðurin hevði fjalt kuffertið í ruskdunganum fyri at forða fyri, at tjóvar skuldu fara við tí.

– Í fyrstani ætlaði eg at taka pengarnar, men samvitskan beyð mær at bera teir aftur, og tað var tað einasta rætta, sigur tann samvitskufulli ruskmaðurin við AP-tíðindastovuna.

## Ivi um eitran

**Russiskir fjølmiðlar halda ikki, at tað var trygdartænastan FSB, sum eitraði ein fyrrverandi KGB-mann í London ella fyrrverandi forsætisráðharran Jegor Gajdar**

Jegor Gajdar hevur tað betri nú, eftir at hann fall í óvit á einum fundi í Írlandi seinasta fríggjadag.

Vesturlendskir fjølmiðlar hava nevnt, at hetta málið kann hava samband við tilburðin við fyrrverandi KGB-manninum Alexander Litvinenko, sum doyði av eitran í London í síðstu viku. Teir vísa á, at Litvinenko hevði lagt Vladimir Putin, forseta undir at hava skipað fyri atsóknum í Moskva og givið kekenskum uppreistrarmonnum skyldina.

Men óheftir russiskir fjølmiðlar halda ikki, at Putin ella FSB hava nakað við teir báðar tilburðirnar at gera. Teir siga, at Putin fær einki gagn av at eitra Jegor Gajdar, og Alexander Litvinenko hevði ikki so stóran týdning, at tað var neyðugt at beina fyri honum.

- Eingin her visti nakað um hann, fyrr enn hann var deyður, skriva russisku bløðini. Tey halda harafturímóti, at ríkmaðurin Boris Berezowsky kann hava havt samband við báðar tilburðirnar. Hann býr í Bretlandi og er av argastu mótstøðumonnunum hjá russiska forsetanum. Sambært russisku fjølmiðlunum kann hann hava beint fyri Litvinenko og roynt at gera tað sama við Gajdar fyri at herða mótstøðuna ímóti Putin.